# ÚTLAND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800 FAX 341801

*– Hitavøksturin frá 1990 til 2000 var tann mesti í 400 ár, men tað er ikki óhugsandi, at vøksturin er tann mesti tey seinastu 2.000 árini.*

*Gerald North, sum er professari á einum lærdum háskúla í Texas*

**STUTT SAGT**

## Hóttir við at fara frá

Forsetin í Eystur-Timor, Xanana Gusmao, krevur, at forsætisráðharrin, Mari Alkatiri, skal leggja frá sær. Ger hann ikki tað, fer forsetin sjálvur at leggja frá sær. Men Alkatiri letur ikki kravið við seg koma. Hann fer ikki frá, sigur hann, og tí er óvist, hvat fer at henda.

Gusmao, forseti, vil vera við, at tað er stjórnin, sum hevur ábyrgdina av ófriðinum í landinum í seinastuni. Fleiri leiðandi limir í stjórnarflokkinum taka undir við forsetanum, og teir hava biðið Alkatiri leggja frá sær, so forsetin kann standa á odda fyri einari fyribilsstjórn, sum skal sita til næsta val.

Ófriðurin í Eystur-Timor tók seg upp fyri einum góðum mánað síðani, tá stjórnin koyrdi 600 og av landsins 1.400 hermonnum til hús. Avgerðin elvdi til ófrið, og minst 20 fólk lótu lív, til 2.500 hermenn úr Avstralia, Malaysia og øðrum londum fingu tamarhald á støðuni.

## Kina ávarar Norðurkorea

Kina verður vanliga mett sum trúgvasti stuðulin hjá norðurkoreanska stýrinum, men leiðararnir í Beijing eru ikki serliga fegnir um ætlanina hjá Norðurkorea at royna eina langtberandi rakett.

– Støðan er sera ørkymlandi, og vit vóna, at allir partar gera sítt til tess at tryggja frið í økinum, segði talsmaðurin hjá kinesiska uttanríkisráðnum í gjár.

USA og Japan hava ávarað Norðurkorea ímóti at royna ta nýggju rakettina. Í gjár kærdu norðurkoreanar seg um, at amerikonsk flogfør hava verið á kanningarferð nærhendis strondini, og teir hóttu við at skjóta flogførini niður, koma tey ov nær. USA hevur eisini sent eitt njósnaraskip avstað við kós ímóti Norðurkorea.

Japan hevur eisini sent herskip og flogfør ímóti norðurkoreonsku strondini. Japanar stúra serliga fyri, at leivdir av norðurkoreonsku rakettini kunnu detta niður í Japan, og tí hevur løgreglan fingið boð um at vera á varðhaldi, skrivar AP úr Tokyo.

## Fáa vápn úr Iran

George Cadey, sum er ovasti fyri teimum amerikonsku herdeildunum í Irak, vil vera við, at shiamuslimskir uppreistrarmenn fáa vápn úr grannalandinum Iran. Hann leggur eisini iransku fregnartænastuna undir at venja uppreistrarmenninar í venjingarlegum í Iran og Libanon.

– Vit eru rættiliga vísir í, at iranar lata uppreistrarmonnunum vápn, heimagjørdar bumbur og tøkni av ymsum slagi, segði George Casey á einum tíðindafundi í gjár. Hann viðgekk kortini, at USA hevur eingi prógv fyri, at uppreistrarmenninir veruliga fáa stuðul úr Iran.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at USA leggur Iran undir at hjálpa teimum shiamuslimsku uppreistrarmonnunum í Irak. Iranska stjórnin vísir skuldsetingunum aftur og sigur, at skuldsetingarnar eru bara ein liður í amerikonsku útspillingini, nú londini stríðast um ta iransku kjarnorkuætlanina.

# Ætlaðu at søkja at háhúsum í Chicago



*Amerikanska løgreglan hevur tikið sjey fólk, sum eru undir illgruna fyri at hava havt ætlanir um at søkja at Seara Tower í Chicago, sum er 442 metrar høgt. Kortini skilst, at ætlaninar vóru ikki serliga komnar serliga langt, og løgreglan hevur heldur ikki funnið spreingievni ella vápn*

*Mynd: Scanpix*

# Kunnu koma í kríggj við børn

**Um ársskiftið skulu norskir og kanska eisini danskir hermenn til Darfur, har teir kunnu koma í bardaga við børn, ið verða brúkt sum hermenn**

**DARFUR**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eftir áheitan frá ST hevur norska stjórnin játtað at senda 170 hermenn til sudanska landspartin Darfur, og danska stjórnin hevur játtað at viðgera áheitanina frá ST við vælvild.

Men teir norsku og donsku hermenninir eiga at fyrireika seg til umstøður, sum teir ikki eru vanir við, og sum kunnu geva bæði teimum og heimafólkinum trupulleikar.

Í einari blaðgrein skrivar norski heryvirmaðurin Robert Mood, at hermenninir kunnu vænta at koma í skotbardaga við børn, tí í Darfur verða nógv børn brúkt sum hermenn. Í einum slíkum skotbardaga kann úrslitið líkjast tí, sum umheimurin kallar hópdráp, skrivar hann.

– Tá fáa vit at síggja, um okkara politiska umhvørvi hevur skilt, at tað er ikki nóg mikið, at stjórnin styðjar hermenninar, men at andstøðan eisini heldur seg frá at heysta politiskan vinning av umstøðunum, skrivar Robert Mood.

# Heitasta árið í 400 ár

**Tað hevur ikki verið so heitt á Jørðini tey seinastu 400 árini sum nú. Ja, kanska hevur tað ikki verið so heitt í 2.000 ár**

**VEÐURLAG**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Jørðin hevur fepur.

Tað er niðurstøðan í einari drúgvari frágreiðing, sum nakrir av teimum fremstu amerikonsku veðurlagsgranskarunum hava gjørt fyri Kongressina í Washington.

– Hitavøksturin frá 1990 til 2000 var tann mesti í 400 ár, men tað er ikki óhugsandi, at vøksturin er tann mesti tey seinastu 2.000 árini, sigur Gerald North, sum er professari á einum lærdum háskúla í Texas, og sum hevur verið við til at skriva frágreiðingina fyri Kongressina.

Ein onnur frágreiðing, sum varð almannakunngjørd í gjár, vísir, at tær nógvu ódnirnar í fjør komu av, at luftin uppi yvir pørtum av Atlantshavinum var sjáldsama heit. Sagt verður, at tað er eitt stig heitari á norðaru jarðarhálvu nú enn fyri 100 árum síðani.

George W. Bush, forseti, og stjórn hansara halda uppá, at tann veksandi hitin á Jørðini er ikki so vandamikil, sum vísindin vil vera við, men tann nýggja frágreiðingin til Kongressina hevur sannført kongressmannin Sherwood Beohlert um, at forsetin fer skeivur.

– Hendan frágreiðingin prógvar, at støðan er álvarssom, sigur hann við CNN.